# Orðini í tøgnini

- Tá tónleikurin frá pípunum heldur uppat, eru oyrað og sinnið friðsæl og opin. Tøgnin er sum moldin, ið er velt og saksað, klár at verða sádd við orðum.
Soleiðis sigur nobelvinnarin í bókmentum, Seamus Heaney, í samrøðu við Sosialin um samspælið millum sínar yrkingar og pípuleikin hjá Liam O' Flynn. Mánakvøldið verða teir báðir, "The Poet and the Piper" at hoyra í Norðurlandahúsinum

SAMRØÐA
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Nobelvinnarin í bókmentum í 1995, Seamus Heaney, er í løtuni á veg til Føroyar, lokkaður av gátuføra navninum "Faroes", hann sum barn hoyrdi í veðurtíðindunum á BBC og drigin av áhuganum fyri norrønari mentan. Vit hava fingið orðið á heimskenda skaldið til eitt prát um, hvussu ein stígur inn um í skaldaheiminum, um kríggj og málsliga tvídráttin, hann sum norðuríri vaks upp við og um tøgnina eftir írska pípuleikin, sum ger sinnið klárt at sáa við orðum

## Á tromini á skaldskapi

*Tú sigur einastaðni, at sum ungur lesandi, kendi tú teg sjálvan aftur í einum persóni hjá E.M. Forster, sum var dømdur til altíð at standa 'uttanfyri' bøkurnar, ein láturligur klintrari ytst á tromini á skaldskapi. Hvussu komst tú sjálvur 'inn um' í skaldskapin og gjørdist ein góður lesari?*

- Fyri at koma í gongd mást tú uttan iva tíðliga hava havt eina góða uppliving við eini ella tveimum yrkingum. Soleiðis hendi tað hjá mær í øllum førum. Tá eg var tannáringur, kendust serliga yrkingarnar hjá Gerard Manley Hopkins sum ein løðing. Og eg upplivdi bæði okkurt fremmant og vælkent, tá eg las "The Scholar Gipsy" eftir Matthew Arnold. Aftaná tað var tað ein spakulig men rættiliga tilvitað gongd. Á universitetinum gjørdist eg púra burtur í Wordsworth og byrjaði enntá at dáma anglosaksiska yrking. Men mær dámdi alt møguligt, tann modernaða amerikanska Robert Frost og miðaldar skotan Robert Henryson. Tá eg byrjaði at arbeiða sum lærari, kendist tað ótrúliga stimbrandi at lesa samtíðar írskar og bretskar yrkjarar sum Patrick Kavanagh og Ted Hughes.

Skaldskapur er ikki ein innspræning, tú kanst geva einum heilum fólki í senn. Skal ein yrking ávirka teg, mást tú tú arbeiða teg inn í hana og lata hana arbeiða seg inn í teg. Fyri veruliga at gerast ein eldhugaður lesari er uttan iva neyðugt at hava eitt ávíst næmi ella lyndi. Men lærarar kunnu hava avgerandi týdning, eins og yrkingar, tú av tilvild rennir teg í, og sum raka tínar sansir og lýsa upp í sinninum á ein serligan hátt. Tó so, eg sigi altíð, at tað er ikki neyðugt at kenna hópin av yrkingum, fyri at tær skulu fáa týdning í tínum lívi. Fýra ella fimm yrkingar, sum tú dugir uttanat, kunnu vera nóg mikið til at geva hesi listini virði.

## Menniskjakorini eru privat

*Ein av tínum yrkingum, "The Republic of Conscience", hevur givið heitið til eina heiðursløn, Amnesty International letur á hvørjum ári. Hvønn lut hevur skaldskapur í einum heimi, har yvirgangur og aðrir ræðuleikar ofta seta dagsskránna?*

- Í hvørjari einstakari mentan er skaldskapur ein partur av verjuskipanini, ein liður í at styrkja felagsandan, eitt slag av leskingarøki, sum øll, ið hava hug, kunnu vitja. Ein professari á Oxford hevur júst skrivað eina bók við heitinum "What good are the arts". Á onkran ótrúligan hátt eydnast tað honum at koma ígjøgnum 250 síður uttan at nevna njóting og afturkenning, sum er tað, vit finna í yrkingum, tónleiki, filmum og sjónleikum. Njótingin stavar í roynd og veru frá afturkenningini, sjálvt um tað, vit kenna aftur, er skeivt og ræðuligt í heiminum. Tað er sjálvandi eitt mistak at halda, at skaldskapur og list kunnu broyta muruna í fólki ella gera tey til betri moralsk menniskju. Men list og skaldskapur kunnu broyta mentanarliga hugburðin og almennu tilvitskuna - og ofta til tað betra.

Mær dámar sera væl nakað, Joseph Brodsky einaferð segði við meg: "Um list lærir okkum nakað, so er tað, at menniskjakorini eru privat". Við øðrum orðum, í eini myrkari tíð, eini tíð við kríggi og ræðuleikum fært tú meir hjálp frá tí, sum styrkir títt andliga lív, enn frá propagandu og retorikki, sum er ætlað at stimbra almenna moralin.

## Málsligur tvídráttur

Sum føroyingur er tað lætt at kenna seg aftur í málsliga tvídráttinum millum írskt og enskt, millum gerandismál og skúlamál, sum ofta setur sín dám á tínar yrkingar. Hjá okkum elvir málkjakið oftast til knarran og málslig nevs, meðan málsligur tvídráttur hjá tær tykist vera ein styrki ...

- W.B. Yeats, sum ikki dugdi írskt, segði einaferð at: "Írskt er mítt tjóðarmál, enskt er mítt móðurmál". Men tað ørkymlaði ikki Yeats, tí hansara røtur stungu djúpt á ensku síðuni av enskuírsku kastuni. Fyri fólk sum meg - ein katolikk frá Norður Írlandi varð granskingin av írska málinum fatað sum mótmentanarligt um ikki beinleiðis undirgravandi virksemi - tað var altíð ein politiskur broddur, eitt slag av stríði uppi í leikinum í tí, vit kallaðu "málspurningurin." Í tjóðskaparsinnaða umhvørvinum, eg vaks upp í, hekk tað nærum ákærandi og ekkafult í luftini, at rætta málið hjá ein sonnum írskum høvunda mátti vera írskt. Men eftirhondini, sum eg kom at kenna Joyce, søguna og málslig skapanarevni loysti eg meg frá hasum ekkanum. Hvar er veruliga írska lyndið betur varveitt, enn i Ulysses? Men eg loysti ongantíð meg sjálvan frá mínum trúfesti og kærleika til skaldsliga og mentanarliga arvin, sum býr í



*Fyrrverandi nobelvirðislønarvinnarar í bókmentum, frá vinstru: Kenzaburo Oe, Derek Walcott, Nadine Gordimer, Gunter Grass and Seamus Heaney bíða til hátíðarhaldið tá Nobelvirðislønin í bókmentum varð lation í Konserthøllini í Stokkhólmi 10. desember í 2001*